# Vetni - í tøkniligari framgongd men orkupolitiskum tómrúmi



*Honda FCV Clarity. Hybrid skipan við 100KW PEM brennikyknu og Lithium Ion battarí á 288Volt. Tangin er ein trýstfløska á 350bar við 4,1kg vetni. Koyring við einari áfylling er 450km, og mesta ferð 160km/tíman*

**Meðan lond kring okkum útbyggja og fyrireika seg til eina nýggja og heilt annarleiðis orkuøld, gongur ongan veg í Føroyum. Orkupolitikkur er enn í ongamannalandi sjálvt um álit er skrivað, har sagt verður, at vit sum frá líður heilt skulu vera uttan innflutta orku. Hvussu hetta risastig skal fremjast verður politisk ikki tikið upp á tunguna, og Visión 2015 er allarhelst gloymd og løgd í skuffuna saman við rúgvuni av álitinum, kanningum og frágreiðingum.**

KÁRI THOMSEN
*Formaður í Føroya Náttúruverndarfelag*

Føroya Náttúruverndarfelag hevur sum aðalmál at verja náttúru og umhvørvið. Seinru árini er vorið meira og meira eyðsýnligt at tvey mál ganga tætt upp at hvørjum øðrum innan náttúruvernd, nevniliga hvussu vit verja um náttúruvirðini og umhvørvið, og hvussu vit gagnnýta náttúrutilfeingið á burðardyggan hátt tá umræður orkuframleiðslu.

Í mai 2002 setti felagið, eftir stóru Orku- og Umhvørvisráðstevnuna, ein arbeiðsbólk, ið serstakt skuldi taka sær av orkupartinum, ið sum vit vita í ávísum førum hevur kravt stór inntriv í náttúruna. Bólkurin nevnist Føroya Nýorka, ið kann samanberast við íslendska felagið Íslendsk Nýorka. Bólkurin telur 5 mans, ein verkfrøðing, ein telduserfrøðing, ein arkitekt og fólk við ítøkiligum royndum innan vindorku.

Gjølla er fylgt við hvussu nýggj orkutøkni mennist uttanlanda innan flestu øki, tað veri seg vindorka, alduorka, sjóvarfallsorka, sólorka og annað. Í samband við m.a. orkuveitan til flutning á landi og sjógvi er somuleiðis fylgt sera væl við, hvussu framburðurin er innan orkutøkni, har talan er um framleiðslu, goymslu og nýtslu av vetni, sum verður roknað sum ein av avtakarunum eftir oljuna.

### Vatn í tangan

Óvanlig fráboðan kom nýliga frá bilaídnaðinum, frá japanska felagnum Genepax, har boðað varð frá, at vatn kundi nýtast beinleiðis sum brennievni til teirra nýggja bil. Fleiri serfrøðingar hava síðan víst á, at tað ikki letur seg gera at fáa ein bil, sum kanska vigar millum 400 og 700 kilo at koyra eitt 80 kilometra strekki við eini ferð á 80 km í tíman upp á vetnisnøgdina í einum litri av vatni. Genepax upplýsir at bilurin hevur eina brennikyknu á 300W, ið er nakað tað sama sum 0,4 hestar.

Ein litur av vatni inniheldur 110,5 gram av vetni, ið hevur eina orkunøgd upp á 3,54KW. Við døminum frá Genepax bilinum nýtast til hvønn kilometur sostatt 44W, og sigur tað seg sjálvt, at so lítil orkunøgd ikki kann draga ein hálvt tons tungan bil ein kilometur við 80 kilometra ferð.

Tað ber ikki til at framleiða vetni uttan ein katalysator, ið t.d. kann vera ravmagn. Fyritøka í Eysturríki hevur framleitt eina metalllegering sum kann klúgva vetni úr feskum vatni, ið síðan kann brennast av í eina brennikyknu. Talan er tó einans um smáar orkunøgdir upp á nøkur fá watt. Tilgongdin (processin) er ikki óendalig, og skal nýtt metall setast til eftir ávísa orkuframleiðslu. Sostatt er tað ikki vatnið, ið skapar orkuna, men metallið.

### Vatn klovið til vetni og súrevni

Næstan allir bilaframleiðarar í heiminum arbeiða við alternativari orkutøkni til bensini og oljuna. Tøknin, at nýta vetni sum brennievni í eini brennikyknu, er ikki nýggj, men hevur verið brúkt í m.a. teim fyrstu rúmdarførunum frá 50´unum. Brennikyknurnar vóru stórar og tungar og framleiddu ravmagn til tey tól nýtast skuldu. Tað at framleiða vetni er elligamalt. Fyrsta dømið vit vita um er frá 1839 har Sir William Grove uppdagaði at ravmagn kann klúgva eitt vatnatom til tvey vetnis- og eitt súrevnismýl (molekyle). Leingi vistu menn at øvugta tilgongdin var møgulig, men gingu næstan 100 ár til Francis Bacon í 1932 framleiddi eina brennikyknutøkni.

Nevnast má danin Poul La Cour, lærari á Áskov Højskole, sum í 1890´unum framleiddi vetni við ravmagni frá smáum vindmyllum hann sjálvur hevði bygt. Vetni bleiv brúkt til lampur, ið settar vóru upp í klassastovunum. Tá lampan bleiv tendrað kom brestur frá, og nevndi teir tí vetnið fyri “knaldluft”.

### Vetnisstøðir bygdar

Hyggja vit eftir hvussu menningin hevur verið innan bilaídnaðin, har lættast hevur verið at fremja tøknina, so roknaðu vit fyri



*Ford Edge. Hybrid skipan við PEM brennikyknu, stødd ikki upplýst, Lithium Ion battarí á 336Volt. Ein vetnistrýstfløska á 350bar við 4,5kg vetni. Koyring við einari áfylling 360km, mesta ferð 140km/tíman*